

# Gylti skógvurin endurvinnast

**Eitt pláss sum næstovastur á máltindinum og tvey silvurmerki er kanska gott. Men tað er ikki nóg gott hjá Arnbjørn T. Hansen, sum saman við liðfeløgunum í EB/Streymi aftur hevur sett kikaran ímóti gullinum**

Tað verður ikki longur tosað um árini, tá EB/Streymur fleiri ferðir var á markinum millum bestu og næstbestu deildina.

Tey trý seinastu árini hava givið trý gull- og trý silvurmerki í lands- og steypakapping, og tí er einki at ivast í, at felagið meddar høgt aftur í ár.

– Vit ynskja sjálvandi at liggja í toppinum. Tað haldi eg vera sjálvsagt. Eingin ivi er um, at vit í fjør høvdu vónir um meira enn tvey silvurmerki. Men soleiðis, sum árið háttaði seg við órógv og venjaraskifti, so var úrtøkan kortini í lagi. Og í øllum førum fingu vit móti kappingarenda prógvað, at vit hava eitt lið, sum eigur at standa seg í toppinum.

Soleiðis sigur Arnbjørn T. Hansen, sum seinnu árini hevur ment seg til kanska vandamesta áleyparan í føroyskum fótbólti. Kvikur á fyrstu metrunum, knappur við avtrekkinum og sera sterkur í luftini, hóast vakstrarlagið ikki er tað hægsta. Hetta seinasta kunnu litavar helst eisini skrivað undir uppá, eftir at teir í fjør máttu boyggja seg fyri loftsterka kollfirðinginum.

### Silvurið mín feilur

Arnbjørn er ein av spælarunum, sum eru orsøkin til framúr góðu úrslitini hjá EB/Streymi. Talan er um nakrar góðar árgangir av spælarum, ið eru uppaldir í felagnum, og sum hesu seinni árini hava ment seg til at teljast millum bestu spælararnar í landinum. Og sjálvur varð Arnbjørn kosin tann besti, tá meistaraheitið í fyrraárið endaði við Margáir. Ikki minst takkað verið 20 málum frá kollfirðinginum.

Í fjør var Arnbjørn nógv skaddur, men kortini gjørdist talan um 17 mál. Júst vantandi málini frá honum vórðu tá mett sum orsøk til, at tað »bara« gjørdist til silvur hetta árið.

– Vit høvdu ikki nóg støðug úrslit í fjør. Og eg haldi sjálvur, at tað kanska hevði verið betur, um eg var púrasta klárur, tá kappingarárið byrjaði. So á ein hátt kenni eg tað, sum var tað mín »feilur«, at vit ikki megnaðu meira. Men hinvegin eru skaðar ikki nakað, sum tú fært gjørt so øgiliga nógv við.

– Í vár havi eg eisini verið skaddur nakað í uppstartinum, men eg haldi, at eg eri 100 prosent til reiðar, nú kappingin stendur til at byrja, sigur Arnbjørn.

### Eru eins sterkir

Lokali samleikin hevur verið ein av avgjørdu styrkjunum hjá EB/Streymi. Millum teirra, sum hava myndað liðið í skjótt nógv ár, eru Bárður Olsen og Marner Djurhuus, men teir eru tveir av spælarunum, sum ikki longur eru í felagnum. Bárður valdi í vetur at skifta til B36, meðan Marner fer av landinum í lestrarørindum.

– Tað hevur sjálvandi stóran týdning, tá tveir av spælarunum, sum altíð hava verið her, ikki eru við longur. Hinvegin haldi eg eisini, at vit hava fingið góða tilgongd seinnu árini. Kristoffur Jakobsen hevur gjørt tað sera gott, og vit hava eisini Pætur Dam Jacobsen, so alt íalt rokni eg við, at styrkin hjá hópinum er á leið tann sama.

*Og hvat skal so rigga, um EB/Streymur nú aftur skal vinna seg heilt upp á tindarnar?*

– Tað er sjálvandi ein heild, sum skal rigga. Men eg haldi, at tað týdningarmesta er, at vit fáa Hans Paula Samuelsen ordiliga at røkka hæddirnar. Ger hann tað, so er ótrúliga nógv vunnið, og so skal eg nokk skumpa bóltin seinastu metrarnar, tá innleggini koma, sigur Arnbjørn T. Hansen.

**» Eg var ikki púra klárur við kappingarbyrjan, og kenni tað tí sum mín feil, at vit »bara« fingu silvur**

### METINGIN

*At talentið er til staðar hjá EB/Streymi, er eingin sum helst ivi um. Skal úrtøkan frá í fjør betrast, er tó umráðandi, at einstaklingarnir halda til heilt kappingarár, soleiðis at missurin á lyklapostum ikki verður ov stórur. Og so fær tað eisini týdning, um nýggju menninir alt fyri eitt megna at fylla holini, sum eru íkomin, nú nakrir av lyklaspælarunum hava leitað sær til aðrar avbjóðingar.*